

# Frændavitjan



*Løgmaður og Halldór Ásgrímsson granska faldara um Norðoyatunnilin, í miðjuni sæst Dávid Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunlinum*



*Trygdin er sjálvsagt í hásæti, tá so fínir gestir vitja Norðoyartunnilin. Øll vórðu klødd í hjálm og vest, hóast tunnilin nærum er liðugur*

**Í hesum døgum vitjar ein stór sendinevnd av íslendingum landið. Talan er um eini 70 umboð fyri íslendskt vinnulív, við forsætisráðharranum, Halldór Ásgrímsson við fylgi, á odda**

VITJAN ÚR ÍSLANDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í gjár hósdagin, hevði Jóannes Eidesgaard løgmaður, bjóðað Halldór Ásgrímssyni og fylgið hansara norður til Klaksvíkar og Fuglafjarðar at vitja virki og kommunur.

## Í Norðoyartunlinum

Fylgið, sum taldi eini 20 fólk, koyrdi ígjøgnum norðoyartunnilin, sum letur upp fyri almenninginum um tríggjar vikur.

Steðgað varð við pumpustøðina mitt í tunnlinum, og bjóðaði Dávid Reinert Hansen, stjóri í Norðoyartunnlinum, forsætisráðharranum vælkomnum, og hann greiddi síðani frá um verkætlanina. Við pumpustøðina er ein brunnur, sum er 67 metrar langur og er hann á lægsta staðnum í tunlinum. Í neyðstøðu tekur hann alt vatnið í tvey samdøgur. Samlaði kostnaðurin fyri norðoyartunnilin er 405 milliónir krónur, harav løgtingið hevur játtað 235 milliónir, sum verða latnar yvir 8 ár. Restin verður fíggjað við lántøku, ið verður rindað aftur eftir 15 árum.

Umleið 275.000 fólk og 125.000 bilar fara árliga um Leirvíksfjørð. Roknað verður við, at ferðslan økist, tá ið undirsjóvartunnilin verður tikin í nýtslu.

## Føroya bjór

Næsti steðgur var hjá Føroya Bjór í Klaksvík, har Einar Waag var vertur. Hann vísti fylginum runt á bryggjarínum og rundsýningin endaði í einum áhugaverdum høli, har framsýning er við søguligum lutum hjá Føroya Bjór. Har var dekkað upp við øllum sløgunum av øli, og sluppu gestirnir at smakka ymsu sløgini, har serligur dentur varð lagdur á nýggjastu ølina Rock All. Forsætisráðharrin var væl nøgdur við ølið, hóast tað serliga var Páskabryggið, sum hevur vunnið mangar altjóða ølkappingar, sum tóktist líka honum best.

Við meiri enn hundrað árum á baki er Føroya Bjór ein av teimum elstu fyritøkunum í Føroyum. Tá Símun í Vági, sum hevði røtur í íslandi, fór til Danmarkar í 1883 at læra til bakara, lærdi hann samstundis at bryggja øl. Fimm ár seinni var hann aftur í Føroyum og byrjaði sína egnu fyritøku. Eftir at hava arbeitt sum bakari, bryggjari, bóndi og reiðari í næstan 50 ár doyði hann 72 ára gamal í 1935. Sonurin, Einar Waag eldri, sum eitt skifti var løgtingsmaður, tók yvir og bygdi bryggjaríið út fleiri ferðir, áðrenn hann fyri skjótt 30 árum síðani lat triðja ættarlið koma til.

## Christianskirkjan

Næst á skránni var vitjan í Christianskirkjuni, har ein livandi Alex Sólstein tók ímóti. Á flótandi nordiskum greiddi hann frá um søguna hjá Christianskirkjuni, um útróðrarsiðir og altartalvuna, áðrenn hann, sera rørandi, framførdi vakra sálmin "Nú leiti eg til tína náði". Stórsligna Christianskirkjan er áhugaverd á nógvum økjum, og hevur hon fleiri met. Eitt teirra er, at dópifunturin er tann elsti – 4000 ára gamal, og Alex Sólstein greiddi frá um áttamannafarið, ið er einasti bátur í natúrligari stødd, sum hongur inni í eini kirkju.

## Havsbrún

Seinastu steðgurin hjá Íslendska forsætisráðharranum var á Havsbrún í Fuglafirði, har Bergur Poulsen, stjóri, tók ímóti. Hann vísti ein part av ovurstóra virkinum, og greiddi frá um framleiðsluna, og var tað týðuligt, at her høvdu íslendski forsætisráðharrin og løgmaður felags áhuga, nú talan var um fiskivinnu.

Havsbrún framleiðir fiskamjøl, fiskafóður og fiskaolju, og verður meginparturin av hesi framleiðslu vunnin úr svartkjafti, sild og lodnu. Havsbrún hevur bygt nógv út seinastu árini, og gjørt íløgur fyri eini 180 milliónir til goymslur og kajøkið. Eitt nú hevur virkið bygt nógvar stórar siloir, umframt at goymslur, sum hava eina vídd uppá 12.260 fermetrar, eru borðaðar inn í fjallið.

Bara lukturin á Havsbrún avdúkaði, at her var talan um eitt fiskavirkið. Framleiðsluhøllin var so rein og fín sum var tað eina operatiónsstovu vit vitjaðu. Framleiðslan á Havsbrún er ómetaliga tøkniliga framkomin, so tann sum roknar við at síggja slógv og sild í longum banum, verður vónbrotin, tí ongastaðni í allari framleiðslugongdini kemur ráðvøran undan kavi. Við ovurstórum pumpum verður fiskurin sogin úr lastini á skipunum, og sjálvvirkandi verður hann fluttur runt í skipanini, til oljan, mjølið ella fóðurið verður flutt inn í goymslurnar.